Vikuskiftis Sosialurin



# Mini-cruise til Íslands

TÍÐINDASKRIV
*Tórshavn 13. mar. 09*

Foreldrabólkurin hjá Føroya Felag Móti Krabbameini skipar fyri spennandi ferð við Norrønu til Íslands frá 1.- 4. juni 2009.

Farið verður úr Føroyum mánadag 1. juni við Norrønu, sum leggur at í Seyðisfirði týsmorgunin. Í Íslandi verður steðgað í tveir dagar. Har verður skipað fyri ymiskum – eitt nú túri á hestbaki og at svimja í heitum pottum.

Norrøna við ferðalagnum verður aftur á Havnini seinnapartin hósdagin 4. juni.

Freistin at melda til luttøku er 15. apríl 2009.

Tilmelding fer fram við at ringja til Føroya Felag Móti Krabbameini telefon 317959/ 217959/217958 ella via teldupost ffk@krabbamein.fo

**Um foreldrabólkin**

Foreldrabólkurin at børnum við krabbameini er ein stuðulsbólkur undir Krabbameinsfelagnum. Endamálið hjá bólkinum er at stuðla og fremja áhugamál hjá foreldrum at børnum við krabbameini. Bólkurin skipar eisini fyri tiltøkum fyri børnum, ið hava, ella hava havt krabbamein og familjum teirra.

Meira fæst at vita við at venda sær til Føroya Felag Móti Krabbameini.

**www.krabbamein.fo**

*Vinarliga*

v/ Føroya Felag Móti Krabbameini og Foreldrabólkin

Jansy Gaardlykke, dagligur leiðari

Og Inga Vang, form. í foreldrabólkinum

# Síðsti kjansur at síggja »Kvinnan í Svørtum«!!

**- og ongar eykasýningar!!**

Farið verður undir seinastu sýningarnar av leikinum »Kvinnan í Svørtum«, og av tí at ein av leikarunum fer av landinum verða ONGAR EYKASÝNINGAR.

Sjónleikurin »Kvinnan í Svørtum« er ein spøkilsissøga av tí góða gamla slagnum, sum vit kenna frá søgum hjá m.ø. Dickens, M. R. James, Edgar Allan Poe og Edith Warthon.

Stephen Mallatratt gjørdi leikin burturúr skaldsøguni »The Woman in Black"« hjá Susan Hill; hann var frumframførdur í Scarborough í 1987, hevur gingið stútt í London síðan 1989, og verður enn framførdur fyri fullum húsum, nú á tjúgunda ári.

Í uppsetingini hjá Tjóðpalli Føroya, ið Hans Tórgarð hevur týtt og leikstjórnað, hevur Páll Danielsen leiklutin sum Kipps, meðan Annfinnur Heinesen er sjónleikarin.

Leikurin hevur verið væl vitjaður síðan fyrstu framførsluna fríggjadagin 13. februar á Tjóðpalli Føroya, og hetta vikuskiftið verða so tær seinastu sýningarnar.

Leikurin fekk sera góð ummæli og leikaranir góð skoðsmál fyri sítt sera góða spæl.

Seinastu sýningarnar verða fríggjadagin 13. mars kl. 19.30, leygar- og sunnudagin kl. 18.00.

Atgongumerki fáast á Kunningarstovuni og við dyrnar 1 tíma undan sýning.





*Bæði Thorvald Stoltenberg og Emma Heinesen vóru sera fegin um, at tey endiliga hittust*

# Emma hitti hetjuna

**Í dag møtti 59 ára gamla Emma Heinesen 78 ára gamla Thorvaldi Stoltenberg, sum hon hevur verið hugtikin av í nógv ár**

FJEPPARI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Tað var í steðginum í tiltakinum, Framtíð Føroya í Evropa, at Thorvald Stoltenberg stillisliga fór yvir til Emmu Heinesen.

Nógv høvdu tey at práta um, og Stoltenberg beyð enntá Emmu koma at vitja seg, um hon var nærindis húsunum hjá honum í Noregi.

Til felags hava tey bæði, at tey hoyra undir stjørnuteknið, krabban, av tí, at tey hava føðingardag 8. og 21. juli.

Millum annað tosaðu tey eisini um framløguna hjá Thorvaldi Stoltenberg, og hansara leikluti í at royna at fáa frið í heimin.

Aftaná, at tey høvdu tosað saman, fekk portalurin orð á tey bæði.

- Hetta er strálandi. Hetta er á ongan hátt nakað eg eri vanur við, og at hon samanber meg við Gandhi má vera ein góð samanbering, og kanska eg sleppi at hoyra fyri tað, tí onkur heima heldur kanska, at eg eri í so tjúkkur, so tað kundi kanska verið eitt hugskot, at etið eitt sindur minni, sigur Thorvald Stoltenberg.

- Tað fløvaði mítt hjarta endiliga at sleppa at møta honum. Vit stóðu bæði og táraðu, og eg gjørdist veruliga heit um hjartað, sigur Emma Heinesen, sum eisini bað Thorvald Stoltenberg heilsa konuni, tí hon má vera heimsins tolnasta kvinna.

- Hann er nokk meira burtur enn sjómenn, sigur Emma Heinesen.

Tá Kaj Leo Johannesen setti ráðstevnuna, greiddi hann millum annað frá, hvussu errin Thorvald Stoltenberg skal vera, tí hann má vera fyrsti politikarin, sum nakrantíð hevur verið í Føroyum, sum verður samanborin við Gandhi.

# Elin vann 3. virðisløn fyri film um Føroyar

Ein sjónbandaframløga um Føroyar kallað Where Nature Rules, sum Elin Brimheim Heinesen hevur gjørt, vann í gjár 3. virðisløn í kappingini The Golden City Gates á ferðavinnuráðstevnu, sum varð hildin í Berlin

Í tíðindaskrivi frá SamVit verður kunngjørt, at Elin Brimheim Heinesen í gjár vann eina filmskappinag á ferðavinnuráðstevnu í Berlin.

Filmsvirðislønirnar fyri ferðavinnu The Golden City Gate hava fylgjandi kategoriir: Býar ferðavinna, øki, búskapur, gistingarhús, sjónvarpslýsingar, sjónvarpssendingar, dagbladslýsingar, lýsingar á internetinum og event marknaðarføring. Elin Heinesen gjørdist nummar trý í kategoriini øki. Grønland vann 1. virðisløn í somu kategori. Ferðaráð úr øllum heiminum senda sítt marknaðarføringstilfar inn, og ein altjóða dómsnevnd við 30 fólkum metir um tilfarið eftir ávísum reglum, sum til ber at lesa um her: http://www.das-goldene-stadttor.de/

Elin sigur í tíðindaskrivi:

"Eg eri rættiliga bilsin um, at filmurin fær henda heiður", sigur Elin. "Eg trúði tí ikki rættiliga, tá eg fekk uppringingina í gjárskvøldið. Hetta er ein framløga, sum upprunaliga var ætlað sum ein skitsa til, hvussu eg haldi, at Føroyar kunnu marknaðarførast, tvs. at hetta er ein ordiliga 'low budget' filmur. Eg havi sitið eftir arbeiðstíð og spælt mær við at seta myndir, tekst og tónleik saman. Tekstin havi eg skrivað út frá einum samankóki av sitatum frá útlendskum vitjandi í Føroyum. Og so havi eg funnið flottar myndir, sum hóskaðu til, og sett eitt av mínum egnu løgum til, tí tað eigi eg rættindini til. Og hygg nú! Nú hevur filmurin vunnið eina virðisløn í eini altjóða kapping! Tað haldi eg, er fantastiskt. Eg eri sera takksom og sendi heiðurin víðari til øll tey, sum hava givið sítt virðismikla íkast til filmin."

Janus Hansen, Ólavur Frederiksen, Daniele Casanova og Elin Brimheim Heinesen hava tikið myndirnar í filminum. Lagið í filminum er "Eitt dýpi av dýrari tíð" hjá Elini Brimheim Heinesen, sum pápin, Jens Pauli Heinesen, hevur skrivað tekstin til. Søren Hyldgaard hevur lagt lagið til rættis til symfoniorkestur. Prague Philharmonic Orchestra við Mario Clemens, orksturleiðara, spælir, og Tórshavnar Mannskór við Bjarna Restorff, kórleiðara, syngur saman við Elini Brimheim Heinesen.

Filmurin "Where nature rules" kann heintast niður her: http://www.samvit.fo/media/wnr.wmv

Filmurin kann síggjast á Facebook her: http://www.facebook.com/video/video.php?v=48199918144

og á YouTube her: http://www.youtube.com/watch?v=Ow2HumAf13w